
Uttangarðsútskifting av Norðtoftahaga, Norðtoftir





Mánakvøldi 12. oktober 2026 kl. 19.00 varð útskiftingarfundur settur í skúlanum á Fossánesi, at viðgera mál um uttangarðsútskifting av Norðtoftahaga, matr.nr. 44a, Norðtoftir.

Møttir vóru: Hans Fuglø Christiansen, Hjalmar Frederiksen, Bjarni Ziska Dahl, Karl Vilhelm Hansen, Jóan Petur Højsted, Elmar Krosstein, Magnus Danielsen og Birgit Johannesen

Nevndin var fullmannað og er hon skipað soleiðis:



Arnold Thomassen, formaður
Olaf í Garði Joensen, nevndarlimur
Tróndur Evaldsson Niclassen, nevndarlimur

Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara, at tað nemur teirra gegni.

Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Nevndarlimirnir hava áður undirskrivaði soljóðandi váttan.



”At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingarnevndarlimur, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum”.

Fram varð lagt:
Skjal nr. 1: Kunngerð, ið hevur staðið á heimasíðuni hjá Norðlýsinum, Hvannasunds kommunu og Umhvørvisstovuni.

Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingina ella lýsingarháttin, svaraði eingin.

Formaðurin lýsti síðani fundin lógliga lýstan og settan.

Skjal nr. 2: Grannastevnuviðtøkan frá 27. februar 2025, við tilhoyrandi skjølum og góðkend av Búnaðarstovuni.


Skjal nr. 3: Skriv frá Uttanríkis og Mentamálaráðnum dagfest 13. februar 2026, har Arnold Thomassen er uppnevndur til útskiftingarformann.

Skjal nr. 4: Útskrift úr rættarbókini 22. mai. 2026, har Olaf í Garði Joensen, Eiði og Tróndur Evaldsson Niclassen, Bøur verða uppnevnd til nevndarlimir.

Víst varð til § 10 í útskiftingarlógini, har møguleiki er hjá teimum, ið hava atkvøtt fyri á grannastevnu, nú at taka málið aftur. Eingin tók orðið.

Formaðurin greiddi síðan frá mannagongdini í samband við útskiftingina, og bað fundarfólkið greiða frá um hagan og skipan av honum.

Norðtoftahagi, matr.nr. 44a á Norðtoftum




er ein fýramarkar hagi og er uml. 777 ha til víddar. Hálv mørk er kongs, og 3 ½ mørk er ogn.

Skipanin er 3 á gyllin. t.e. 192 áseyð. Røktin er 24 áseyð, og nakað av seyði er til hagastýrislimir so samlaða talið er 230. Hagin er skipaður í kenning.

Tvær gongur eru - Fiskaáir og Suður á Barði, og markið millum gongurnar er Stóra í Tjørnidali.

Suðuri á Barði (Barðgongan) ber uml. 90 áeyðir, og mett verður at besti seyðurin kemur kemur hagani. Suðuri á Barði legst lítið av kava.



Gongan við Fiskiáir (Heimaragonga) suður frá bygdini. Ringasti hagi til seyð er um Fiskiáir, og rákarløgunum undir Toftaknúk og Krúnufjall gongur ongin seyður. Um miðan haga er ringast til kava. Her kann seyður fara av skalva- og áarlopi.

Ovasti maður gongur gjøgnum Katlarók. Katlarók gongur um um oynna.

Í februar/mars verður seyðurin tikin heim. Móti sumri verður seyðurin sleptur út í haga

Nú er ein røktingarmaður, sum hevur røkta í 27 ár, Fyri uml. 20 árum síðan vóru tveir røktingarmenn. Áður hava verið upp til fýra røktingarmenn.

Fjallskipanin er 16 mans, t.e. 4 á mørkina.

Býti hevur verið at 1/3 er í Barðgongu og 2/3 í Heimarugongu.

Dalarnir verða riknir oman og bakkaraksturin er langur. Seyðurin er góður at reka.

Tað tekur uml. 2 tímar at ganga av Barðgjógv og heim til Norðtoftir. Nakað longur er undir rakstri. Seinasta fjall var farið kl. 730 og komið var í rætt kl. 17.

Beint sunnanfyri bygdina er rættin, sum hoyrur til hagan, men tey seinastu árini hevur verið rættað í seyðhúsinum hjá Magnus Danielsen.

Áður var Barðgongan feli, og hildið var at skipa var í kenning í 60-unum. Eftir at hagin er skipaður í kenning eru fylgini fallin burtur og onki fundarfólk kendi til gongd og stødd á fylgjunum. Heldur ikki hevur verið møguligt at frætt frá eldri monnum hvussu var tá Barðgongan var skipað sum feli.

Innangarðs eigur hagin matr.nr. 42. Størsti parturin er fjøran.

Hagin eigur væl av innistandandi peningi, ikki hevur verið gjørligt at fáa nágreinuliga talið. Hagin hevur nakað av inntøku fyri vatn til smoltstøðina.

Bæði á grannastevnu og á útskiftingarfundinum var semja millum eigararnar at ynski var at býta hagan í tvey. Eigararnir mettu um at tað fór at betra um raksturin av haganum.

Nevndin er samd um at ganga eigarans ynski á møti og metir at tað er møguligt at býta hagan í tveir partar.

Síðan var tosa um hvussu møguligt var at býta hagan í tvey og hvar eigararnir ynsktu at vera.

Áðrenn fundurin var slitin var heitt á eigara um at senda inn ynski um býti at haganum og í hvørjari gongu ynskt var at vera.

Ynskini og viðmerkingar skulu sendast sendast til útskiftingarnevndina á telduposti us@us.fo innan **14. nov. 2026.**

Fundurin varð slitin kl. 21.

Olaf í Garði Joensen **Tróndur Evaldsson Niclassen** **Arnold Thomassen, fm.**





